Til læraran

Hon, sum róði eftir ælaboganum - uppgávur



Rakel Helmsdal

Hon, sum róði eftir ælaboganum

Perma: Áslaug Jónsdóttir

Bókadeild Føroya Lærarafelags 2014

NÁM

Um søguna:

Rakel Helmsdal hevur skrivað eina søgu, sum fangar bæði vaksin og ung, t.d. næmingar í 9. flokki. Hon er um 16 ára gomlu Argantael, sum hevur mist mammu sína. Mamman hevur tikið lívið av sær. Argantael kennir seg einsamalla. Pápin er fráverandi, omman er dement, og hon dugir ikki at tosa við sínar vinir, Enu og Sebastian. Argantael er forelskað í Dagan, sum er fleiri ár eldri enn hon. Hann eigur eina fostursystur, Morgana. Argantael er sera hugtikin í Morganu, eitt sindur forelskað í henni eisini, samstundis sum hon er forelskað í Dagani.
Søgan er sera kensluborin. Huglagið er áhugavert, og hetta er ein góður møguleiki hjá næmingunum at gerast meir tilvitaðir um, hvussu huglagið verður skapt í teksti. Søgan er døpur, men har eru eisini tekin um vón.
Afturvendandi evni eru kærleiki millum gentu og drong, kærleiki millum tvær gentur, kærleikstríhyrningur, viðurskifti millum foreldur og børn, vinalag, sjálvmorð, ungdómur, vansorgan o.o.
Søgan er stutt og skjót at lesa. Til ber at lesa alla søguna upp fyri næmingunum í skúlanum og viðgera hana. Til ber eisini at geva næmingunum fyri heima, men tá er týdningarmikið at fyrireika tey áðrenn, hvørjum tey skulu lesa eftir fyri at tey skulu fáa nóg mikið burturúr.

Áðrenn vit lesa:

Hyggja eftir permuni og spyrja:

Framman:

Hvat? Eitt svart berg, reyð luft, nótar, genta, pappírslepar, heitið á bókini: *Hon, sum róði eftir ælaboganum.*
Hvør? Ein genta.
Hvar? Stendur á einum bergi.
Hví? Vit gita: Hon ætlar at gera sjálvmorð

Vit kunnu tosa um, hví bókin man eita *Hon, sum róði eftir ælaboganum*. Hvat merkir tað? Hvat er ein ælabogi? Onkur næmingur dugir kanska at greiða frá reint fakligt, hvat ein ælabogi er. Annars kunnu vit tosa um, at ælabogin verður settur í samband við okkurt yvirnatúrligt, dýrgripir. Okkurt, sum vit síggja, men sum vit ongantíð kunnu røkka.

Aftan:
Hvat? Svørt fjøll og svartur sjógvur við hvítum aldum, reyð luft, genta, árabátur
Hvør? Sama genta.
Hvar? Rør í einum árabáti.
Hví? Vit gita: Man hon ætla at gera sjálvmorð?

Vit lesa aftanfyri, og har fáa vit at vita, at onkur hevur dripið seg heima hjá gentuni, og at tað lættliga ber til at drepa seg við einum hvøssum knívi. Her fáa vit eisini at vita, at gentan skræðir dagbókina hjá sær sundur.

Innaní:
Innaní stendur eitt bíbliuvers á latíni og á føroyskum, sum er um lívið og tess gátur. Innihaldsyvirlitið vísir italsk tónleikaheiti + navn á kapitlinum. Niðriundir stendur, at rithøvundurin Rakel Helmsdal hevur fingið íblástur til kapitlarnar frá tónleikaverkinum *Enigma Variations* eftir Edward Elgar.

Edward Elgar:
Næmingarnir fáa at vita, at Edward Elgar var enskt tónaskald. Hann undirvísti, og 21. oktober 1898 kom hann móður og troyttur heim úr arbeiði og settist við klaverið at spæla. Hann fann uppá, meðan hann sat, og kona hansara vísti stóran áhuga fyri tí, hann spældi. Hetta gjørdi, at hann skrivaði eitt stórt verk. Íblástur fekk hann frá persónsmenskunum hjá fólki, hann var góður við. Hann varð liðugur við verkið 18. februar 1899, og 19. juni 1899 varð tað framført á fyrsta sinni í St James's Hall í London. Hann kallaði verkið *Enigma Variations*. Enigma merkir gátur, og til henda dag hevur verið gitt um verkið. Edgar Elgar er eisini kendur fyri at hava skrivað verkið *Pomp and Circumstance Marches*, haðani vit t.d. kenna sangin *Land of Hope and Glory*.

Vit lurta eftir Enigma Variations:
Meðan vit lurta, fáa næmingarnir til uppgávu at finna lýsingarorð, sum lýsa huglagið í tónleikinum. Fáa dømi upp á lýsingarorð: dapurt, syrgiligt, dramatiskt, ógvusligt, lívligt, jaligt, eydnusamt, og tey kunnu finna onnur sjálv. Harafturat skulu tey skriva niður, nær huglagið skiftir. Um tú setir vísaran á tíðarstrikuna á youtube, sært tú hvussu langt stykkið er komið.

Uppskot til leinki at lurta eftir:
https://www.youtube.com/watch?v=SvA6FtN8-n0 31.51 min, 1-8. partur er fram til 10.13, og tá áttu tey at havt funnið eini 5-6 ymisk lýsingarorð. Mær dámar væl hetta leinkið, tí tú sært eitt orkestur spæla, og tú kanst lesa okkurt av tónleikarunum. Onnur leinki eru meir hóskandi í longd, men tá sært tú bara eina mynd í meðan.

Til ber eisini at biðja næmingarnar lýsa skifti av veðurlagnum í Føroyum, so hvørt sum tónleikurin skiftir.

Persónar: Argantael, Dagan, Morgana, Ena, Sebastian, Adrian Samuel, Eugenia Samuel, dementa omman o.o. (Irith, Ernafastir, pápi Dagan)
Argentia: Latínska heitið fyri silvur
Morgana: Morgan Le Fay, eisini nevnd Morgana, hálvsystir og mótstandari hjá King Arthur. Eisini lýst sum heks, sum dugir gand. Le Fay stendur fyri "álvan". Fatamorgana eitur eftir henni, er ein hvørvisjón, sum verður misskilt.
Dagan: Hebraisk uppruna - merkir korn.

Ansa eftir, meðan tit lesa, at tit tosa og skjalfesta tíðina. Lopini í tíðini kunnu gera søguna eitt sindur fløkjasliga, men samstundis eru tey ein partur av tí, sum ger søguna áhugaverda.

Meðan vit lesa:

Lærarin lesur upp fyri næmingunum. Hvørja ferð ein partur er liðugur, brúka næmingarnir 3-5 minuttir at skriva stikkorð til, hvat tey hava fest seg við. Lærarin og næmingarnir skriva í felag stikkorð/stuttar setningar á talvuna.
Øll bókin verður sjálvandi ikki lisin sama dag. Tað er týdningarmikið, at tikið verður afturíaftur, áðrenn lisið verður víðari, tá ið ein dagur ella fleiri eru, síðani lisið varð síðst.

1. partur: Skræða, andante, róligt, flótandi.
In medias res, okkurt er hent áðrenn, hví skræðir hon dagbókina sundur? Hvussu er huglagið? Er tað nakað serligt, sum skapar huglagið? (Kvøld, illveður, vindur, litirnir)
Orð at leita upp: gjálv, slotar, onyx.

2. partur: Fjøtur, l'istesso tempo, sama tempo.
Pápin og pápabeiggin tosa. Argantael finnur útav, at mamman fleiri ferðir hevur roynt at gjørt av við seg. Pápin er bundin at mammuni, kann ikki fara frá henni. Hvussu við kynsleiklutinum her? Uppgávan hjá mammum, hjá pápum? Hví-spurningarnir til endans? Hvussu verða mamman og pápin lýst?
Orð at leita upp: jarpt hár, metropol.

3. partur: Tvey fet til vinstru, allegro, lívligt tempo.
Hon velur at liva og ikki at leypa á sjógv og gera av við seg. Sebastian, Dagan, vinur, elskari, hjartasorg, sjálvmorð, myrkt, kvøld, ilsligt, dapurt, Argantael velur at liva.
Orð at leita upp: fernisera, slýggjut.

Áðrenn tit fara í holt við 4. part, kundi tað verið gott at nortið við endan og heitið á 3. parti, har hon fer tvey fet til vinstru, men ikki 1 fet fram, so hon ger ikki av við seg á hesum sinni.

4. partur: Kobla úr, allegretto, seinni enn allegro.
Dagan, 7 ár eldri, dansa, elskast, eydnusom 1. ferð í bókini, koblar úr, letur tað henda, drekkur.
Orð at leita upp: Mannchauvinisma.

5. partur: Eitt stig fram, allegro di molto, sera skjótt.
Á kaiini, umborð á Katalinu. Rør. Følir seg til fortreð/til yvurs, kann tað sama bara fara. Mynd á s. 45 sum ein veingarskotin rovfuglur.
Orð at leita upp: at hirða, at hvølvast.

6. partur: Spitølsk, moderato, javnt skjótt, millum andante og allegro.
Í skúlanum, úti. Mamman hongt seg, jarðarferð, øll taka frástøðu. Sebastian roynir at tosa við hana, men hon rýmir. Pápi Sebastian eisini gjørt av við seg. Argantael saknar ikki mammuna. Oysregnar. Hon fer, gongur móti Baraldargøtu, har Dagan býr.
Skrivingarlag: s. 45: Ljósa hárið leikaði í lotinum. Poetiskt, vakurt.
Orð at leita upp: Styx: Áin, sum er markið móti Hades, deyðríkið í grikskari gudalæru.

7. partur: Sár, andantino, skjótari enn andante.
Í bátinum, á ellisheiminum, á konsert, aftaná maimánað, omman dement, mamman útlendsk, støð nevnd, “endatankar”, forsømd, gloymd, sovnar umborð á Katalinu.
Orð at leita upp: cichlidur = fiskaslag til akvarium.

8. partur: Várofrið, presto, skjótt.
Kærleiki, tvíkynd, tiltrekkjandi, gott veður, vár, Morgana hálvsystir Dagan, sangur, hellið, Lundshúsini, søgn um gud/gudinnu, miðpunkt (mynd s. 68), Argantael følir seg hava týdning.
Orð at leita upp: Femme Fatale.

9. partur: Set segl, allegretto, seinni enn allegro.
Í bátinum, vaknar, hugsar um Dagan, 4 mør, síðani hon hitti Dagan fyrstu ferð. Dagan er avslappaður, hvílir í tí, sum er, ynskir bara árar, Argantael hvílir ikki, leitar eftir onkrum betri, vil hava meir ferð á, okkurt skal henda (s.81)

10. partur: Pinnagentan, adagio, róligt, seint.
Harðskapur, munur á umstøðunum hjá Argantael og Enu, pápi Enu slær, Ena tosar um, hvussu lætt tað er at drepa onkran, falskir vinir, dagbók, Siggert, heima hjá Argantael og heima hjá Enu. Argantael hevur 9 ára føðingardag. Sjálvsmynd av Enu (s.87), mynd av mammu Argantael (s.85), um Enu (s.88).

11. partur: Oktobersól, allegretto, seinni enn allegro.
Oktober, hon rør úteftir, men byrjar at hugsa, hví hon vil tað. Ásannar, at hon hevur fólk um seg, sum eru góð við hana, men at hon ikki dugir at taka í móti tí.

12. partur: Endurtøkur, allegro di molto, sera skjótt.
Bræv, Sebastian og Ena kedd, saknur, vinir. Argantael skumpar tey burtur, pápi Sebastian sálarsjúkur, innlagdur, ger sjálvmorð, bilvanlukka, 15. september, 28. mai. Sebastian og pápi hansara vóru bestu vinir, biður orsaka, Sebastian vil hava Argantael at vakna og koma aftur. Argantael stingur seg av brosjuni (mynd s. 103).

13. partur: Óløgi, andante, róligt, flótandi.
Í bátinum, Dagan og Morgana, 35 dagar síðan Argantael hitti Morganu fyrstu ferð, følir seg býtta, tá ið hon hittir Morganu. firvaldur, Lundshúsini, ælabogin. Morgana verður lýst (s. 106/108) næstan systkin, hyggur inneftir, rør inneftir, vil inneftir, sær dýrgripin. Bara Dagan og Morgana hava gjørt, at Argantael følir seg livandi.

14. partur: Gentan við firvaldinum á bakinum, romanza. Romantiskt tónleikastykki.
Morgana, kærleikstrýhyrningur, Argantael ætlar at leypa fyri tokið, bergholsball, Dagan og Morgana dansa og mussast, Sebastian steðgar Argantael í at gera av við seg. Brennivín, ikki sum amman, øvundsjúka, róligur dansur, torir ikki at viðganga, at hon er forelskað í Morganu, 2 støð nevnd, Port Janua og Port Dimidia. (mynd s. 116).

15. partur: Hon, sum róði eftir ælaboganum, allegro di presto, skjótt og lívligt.
Pínutablettir, hugsar um Dagan og hini, sum hon er góð við, gevur teimum lyfti, ilt, svongd, neyðsynjarkassi í bátinum, angrar, ælabogin, livir, dýrgripur, eitt og so tvey.

Tá ið vit hava lisið:

Lesiringar

Gev næmingunum hvør sín leiklut í lesiringinum. Lat tey fyrireika seg eina løtu, áðrenn tey seta seg saman. Tey kunnu møgl. vera í bólki saman við hinum, sum hava sama leiklut sum tey fyrst og fyrireika seg. Printa út og laminera. Klipp sundur og být næmingarnar í bólkar við at geva teimum hvør sín leiklut. Í lesiringinum skulu tey ikki leggja dent á at skriva, men heldur brúka brot í søguni, vísa á síðutal og reglur, har viðkomandi tekstur stendur. Tey kunnu skriva stikkorð, men ikki brúka tíð uppá at skriva.

Leiðvísari

- Tú skalt finna eitt brot í søguni, sum tú vilt lesa umaftur fyri bólkinum
- Tað kann vera syrgiligt, stuttligt, spennandi, ræðandi ella áhugavert
- Hvat velur tú?

Ljóskastari

- Tú skalt lýsa eitt brot í søguni, sum fær teg at síggja eina mynd inni í høvdinum á tær
- Tað kann vera ein persónur, eitt umhvørvi, ein hending, eitt spennandi petti ella okkurt annað

Leikstjóri

- Tú skalt við tínum spurningum hjálpa bólkinum í gongd við at kjakast
- Spurningarnir kunnu byrja við:
  – Hvat ...
  – Hvussu ...
  – Hvat heldur tú …
- At enda tekur tú samanum

Orðasmiður

- Tú skalt leita eftir orðum í søguni, sum kunnu vera:
  – Nýggj
  – Torfør
  – Løgin
  – Stuttlig
  – Áhugaverd
  – Týðandi
- Á hvørjari síðu stóðu tey?

Sambindari

- Tú skalt finna eitt brot ella eitt petti í søguni, sum minnir teg um okkurt, sum:
  – Er hent tær
  – Tú kennir aftur
  – Tú hevur sæð áður
  – Tú hevur hoyrt um áður
  – Tú hevur lisið um áður

Bólkaarbeiði:

Haldið áfram í somu bólkum. Viðgerðið hesar spurningar:
Í hesum bólkaarbeiðinum er týdningarmikið, at upplýsingar verða niðurskrivaðar. Hetta fyri at tey hava okkurt at halda seg til, um tey til prótvtøkuna skulu brúka arbeiðið við høvuðsverkinum.

1. Lýs persónarnar: Argantael (s. 68-69), Lýs Dagan (s.35 og 81), Morganu (s. 70-71), Enu (s. 83-95), og Sebastian (s. 11, 51, 55). Munnu nøvnini á persónunum hava týdning? Kunnu tey merkja nakað?
2. Greið frá, hvat myndin við býflugunum og hunangskøkuni (s. 68) merkir, og greið frá, hví Argantael følir seg spitalska.
3. Greið frá, hvat myndin við Móses (s. 69) merkir.
4. Hví heldur tú, at Morgana sigur: "Eg eri Morgana"? (s. 74).
5. Kanna eftir, hvussu langa tíð søgan fevnir um. Ansa eftir lopum í tíð. (Næmingarnir kunnu møgl. gera eina tíðarlinju.)
6. Hví eitur bókin *Hon, sum róði eftir ælaboganum*?
7. Hvat fekst tú burturúr søguni? Hvørjum spurningum situr tú eftir við? Kundi søgan endað øðrvísi?

At seta í frásjón. Leggið fram og kjakist í flokkinum.
1. Greið frá afturvendandi evnum í bókini, nevn dømi um afturvendandi evni úr søguni.
2. Kennir tú aðrar tekstir, sum hava somu afturvendandi evni?
3. Kennir tú aðrar tekstir, sum eru skrivaðir í sama tíðarskeiði? Hvussu líkjast teir? Hvussu líkjast teir ikki?
4. Hvussu hóskar søgan til samfelagið, vit liva í í dag? Hvørjar samfelagsstættir hoyra vit um? Er munur á gerandisdegnum hjá teimum ungu? Ík/fátæk? Líkist hetta gerandisdegnum hjá teimum ungu í dag? Kundu hendingarnar farið fram nú? Hví? Hví ikki?
5. Hevur Rakel Helmsdal skrivað aðrar søgur? Hvussu líkist tað/líkist tað ikki hesum tekstinum?

Spurningar til rithøvundin

Næmingarnir kunnu skriva spurningar, sum tey kundu hugsað sær, at rithøvundurin svarar uppá. Teir kunnu skriva niður, og tit kunnu kjakast um, hvørt tit vilja, at rithøvundurin skal svara teimum ella ikki.
Skrivið niður spurningar, sum tit kundu hugsað tykkum at spurt rithøvundin.

Til endans kunnu næmingarnir gera eitt skrivligt bókaummæli at lata inn.

Fyri at næmingarnir skulu vita, hvat uppgávan er, kanst tú vísa teimum hesi bókaummæli, áðrenn tey sjálv fara í gongd.

Strok:
Hetta er uml. 250 orð: http://www.strok.fo/so-reyd-sum-blod
Røddin:
Hetta er uml. 750 orð: http://kvf.fo/roddin/greinar/2015/09/14/ummaeli-eg-eri-malala

Hesir spurningar kunnu vera viðkomandi, og tað kann lættliga gerast eini 400-500 orð.

Bókaummæli

Tú skalt gera eina samanhangandi frágreiðing, har tú skrivar uml. 400-500 orð. Í frágreiðingini skalt tú svara øllum spurningunum niðanfyri.
GG! Tað er ikki altíð, at allir spurningarnir kunnu svarast líka gjølla. Ímynda tær, at bókaummælið skal leggjast út á internetið, so øll kunnu lesa tað.

Ger eina hóskandi yvirskrift.

1. Hvussu eitur bókin? Hvussu hóskar perman til heitið á bókini?
2. Sig stutt frá um gongdina.
3. Hæddarpunkt í bókini. Hvar er bókin mest spennandi? (Kunnu vera fleiri).
4. Tíð: Nær gongur søgan fyri seg, og hvussu langa tíð fevnir hon um? (Grundgev fyri, hví tú veitst/heldur tað).
5. Umhvørvið: Hvar gongur søgan fyri seg?
6. Persónslýsing av týdningarmestu persónum í bókini (Útsjónd og persónleiki).
7. Sig frá málinum í bókini. (Hvussu er bókin at lesa og hví, og hvørjum sjónarhorni verðu søgan lýst úr).
8. Hvat ætlar rithøvundurin at siga við bókini (Um menniskju/lívið sum heild)?
9. Hvørjar aðrar bøkur (ella annað) hevur tú lisið, sum minnir um hetta? Hevur tú upplivað nakað sjálv/ur, sum kann samanberast við nakað í søguni?
10. Hvat veitst tú um rithøvundin?
11. Annað, tú ynskir at fortelja um tína bók?
12. Enda við tínari egnu meting av bókini, vilt tú mæla øðrum til at lesa bókina? Hví? Grunda gjølliga.

Góðan arbeiðshug.

Til stuttleika:

Á www.kahoot.com liggur ein quiz við spurningum úr *Hon, sum róði eftir ælaboganum*. Hetta eru spurningar, har svarini eru at finna á reglunum. Quizzin eigur ikki at vera berandi í arbeiðinum við skaldsøguni, men kann nýtast sum eitt stuttligt íkast. Tit finna hana við at leita eftir *Hon, sum róði eftir ælaboganum*, og tað er brúkarin liv.magnussen, sum hevur gjørt hana.

Lýsing av undirvísingargongd

(Eitt skjal til hvørja undirvísingargongd)

Skjalið verður útfylt av avvarðandi lærara og latið leiðslu skúlans, tá undirvísingargongdin er framd. Tá talan er um prótvøkuflokk, skulu lýsingar av øllum undirvísingargongdum latast leiðslu skúlans í seinasta lagi 1. apríl í verandi skúlaári.

Heiti 1	**Yvirskipað heiti á undirvísingargongd** *Hon, sum róði eftir ælaboganum*
Innihald	**Nýttar bókmentir og annað undirvísingartilfar** Rakel Helmsdal: *Hon, sum róði eftir ælaboganum* Edward Elgar: *Enigma Variations(youtube)*: https://www.youtube.com/watch?v=SvA6FtN8-n0) Bókaummæli á Strok og á Røddini. http://www.strok.fo/so-reyd-sum-blod http://kvf.fo/roddin/greinar/2015/09/14/ummaeli-eg-eri-malala
Tíð	**Tímatal, sum er brúkt til undirvísingina** 5 tímar um vikuna í 5 vikur
Øki úr námsætlanini, sum dentur hevur verið lagdur á	**Støðisførleikar og fakligir førleikar** - lesa um fantasi, kærleika, forelskilsi, viðurskifti millum foreldur og børn, vinalag, sorg, sálarkvøl, sakn og angist - læra grundleggjandi greining og tulking av bókmentaverki - seta bókmentaverkið í frásjón í mun til samtíðina og samfelagið í dag, rithøvundin og annað, sum hon hevur skrivað, og í mun til afturvendandi evnini, eru tey viðkomandi fyri ung í dag, hvønn annan skaldskap kennir næmingurin við sama evni. - gera bókaummæli - fara í dýpdina við ávísum pørtum av bókini - leggja fram fyri hvørjum øðrum - grundleggjandi greining og tulking av ymiskum tekstsløgum, umframt at seta tekst í frásjón - grundleggjandi greining av skaldskapi av mannamunni - at tillaga lesihættir til lesiendamál, tekstslag og miðil, umframt at nýta ymiskar strategiir viðvíkjandi lesifatan - at meta um skrivlig avrik og framløgur hjá sær sjálvum og øðrum - at skriva ymisk fagur- og yrkisbókmentalig tekstsløg - at skriva frásøgukent, gera viðmerkingar og grundgeva

	- at orða seg málsliga rætt og greitt í ymiskum málsligum stíllegum við fjølbroyttum orðatilfeingi - at nýta orðabøkur, rættstavara og leitiskipanir á teldu - at nýta tekstviðgerð og framløguforrit
Týdningarmestu arbeiðshættir	**T.d. floksundirvísing, sjálvstøðugt arbeiði, verkætlan, nýtsla av lærugreina-forritum, skrivlig avrik, royndararbeiði, tvørgreinaligt samstarv o.s.fr.** Upplestur, ymisk sløg av bólkaarbeiði, innlating av skrivligum avriki. Hvussu: Eg lesi søguna upp, meðan næmingarnir fylgja við í sínari bók. So hvørt, sum vit verða liðug við partarnar, skriva næmingarnir nøkur stikkorð til, hvat teir festu seg við í partinum. Tá ið vit hava lisið alla bókina, sum hon er, velja vit nakrar partar/nøkur evni burturúr at arbeiða við. Eg geri uppgávur til partarnar, og tey arbeiða í bólkum við teimum. Gera bókaummæli at lata inn til endans. *Persónslýsingar: Argantael, Dagan, Ena, Sebastian, Morgana, mamman og pápin* *Spurningar, sum kunnu setast til tekstin: Hvør er Argantael, hvør er Morgana, hví ger mamman av við seg, hví er pápin so fjarur …*
Eftirmeting (til egið brúk lærarans)	**Í hvønn mun eydnaðist undirvísingargongdin eftir ætlan? Hetta gjørdu vit:**
	Var nýtta tilfarið hóskandi?
	Var nýtta tímatalið hóskandi?
	Í hvønn mun náddu næmingarnir settu førleikamálunum?
	Hvussu eydnaðust ymsu arbeiðshættirnir?
	Uppskot til broytingar?